Nú skal eg aftur læra at ganga

-Men eg havi sett mær fyri at ganga á›renn dótturin, og hon ver›ur fimm mána›ar í dag sigur 29 ára gamli Martin Karl Olsen, ætta›ur úr Vági, sum misti beini›, tá hann datt úr einum stiga beint fyri Ólavsøku

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Keypmannahavn, Sosialurin: Hálvask‡mt er inni á sjúkrastovuni á epedemisku deild á Ríkishospitalinum, har 29 ára gamli vágbingurin, Martin Karl Olsen, liggur. Hann liggur her, tí hann hevur fingi› útslett av nógva heiliváginum. Bert ein song er inni og kring hana standa tey nærmastu og royna at stu›la Martin Karl. Fyri einum gó›um mána sí›an var hann ein spelkin, frískur unglingi, ítróttarma›ur. Nú liggur hann í songini og hyggur eftir stumpinum á vinstra beini, sum er av um knæi›. Hann liggur uttan d‡nu og er heitur og útbrotin av øllum heilivágnum, hann hevur fingi› seinastu vikurnar. Rey›flekkutur sum ein brunasjúklingi og mó›ur. Hann hevur sæ› verri út, er nú blikna›ur aftur.

Hann hevur gott fólk kring seg. Gentan, fimm mána›ar gamla dótturin, foreldrini og systurin og tey royna eftir førimuni at ugga Martin Karl og sjálvi at fóta sær, nú óeydnan rakti tey so meint.

-Eg var langt ni›ri í fyri tveimum døgum sí›an. Hev›i nógvan fepur og visti hvørki út ella inn. Visti ikki um eg í heilatiki› klára›i ta›, men nú gongur betri, eg havi matarlyst í dag, havi faktisk eti› fyrsta døgur›an í langsamiliga tí›. Akkurát nú kenni eg ta›, sum bara ein lei› finnst, og hon er full drøn frameftir, sigur Martin Karl Olsen

Serstaki sjúkrahúsluktur-in hongur í stovuni. Frísk blomstur síggja eitt sindur ónáttúrlig út her inni. Ein kundi rokna› vi› berari elendigheit á slíkum sta›, men hóast skaddur og likamliga merktur av vanlagnuni, so l‡sir sjálvsáliti› út úr eygum Martin Karls, og hann fer at grei›a frá degnum, tá hann datt úr stiganum.

Skuldi trekkja ein seym

- Eg stó› í stiganum uppi undir takskegginum og skuldi trekkja ein seym út, so veit eg ikki rættiliga, hvat hendi, men eg datt aftur eftir úr stiganum og kom standandi ni›ur. Eg sá beinanvegin, at ta› var heilt gali›. Vinstra bein peika›i beint frameftir mest sum í vinkul. Onki fólk var í nánd, og eg rætta›i brotna beini› eitt sindur upp, grulva›i út til vegin og rópti um hjálp, sigur Martin Karl.

Og me›an Martin Karl fortelur um hesa hending, so er eisini pláss fyri skemti. Pápin, Jákup Olsen, spyr skemtandi um sonurin fekk seymin út. Martin Karl svarar og bi›ur pápan sjálvan fara at hyggja eftir, tá hann kemur heim aftur.

-Eg var› fluttur á Landssjúkrahúsi›, og nakrar tímar seinni var eg á veg ni›ur vi› flogfarinum hjá Atlantic Airways. Eg visti, at okkurt var gali›, hev›i illgruna um, at eg kanska fór at missa beini›, men vóna›i ta› besta, sigur Martin Karl.

-Tá so læknin á Ríkishospitalinum kom og seg›i sum var, at teir vóru noyddir at taka beini›, fóru gardinurnar ni›ur. Eg hugsa›i beinanvegin um gentuna hjá mær og vildi, at hon sá meg á›renn. Hon var tá stødd í Su›uroy, sigur Martin Karl.

-Í fyrstani hugsa›i eg, so fór hetta, men seinni fekk eg móti› aftur og hugsa›i, at eg skal nokk vinna meg aftur. Eg veit, at eg nú komi at ver›a eitt anna› menniskja, eg fari at hava eina a›ra útstráling, og kanska fari eg at vera í meira javnvág vi› meg sjálvan. Eg havi altí› veri› ein buldrari, sigur Martin Karl.

Ringt at koma heim

-Eg vænti ikki, at tann stóra reaktiónin kemur, fyrr enn eg komi heim, ikki fyrr enn eg síggi sta›i›, har eg datt, men eg stúri ikki fyri at koma heim. Sjálvandi gráti eg eitt sindur um stø›una í dag, men ta› skal til, sigur hann.

Gentan, Regina av Økrum, kom ni›ur sama dag, sum beini› var amputera› av Martini. Hon er 23 ára gomul og lesir til sjúrkasystir. Hon var hjástødd eina løtu undir skur›vi›ger›ini.

-Eg eri gla› fyri, at eg var hjástødd. Ta› ringasta var at sita í Vágum og bí›a eftir at sleppa ni›ur. Óhappi› hendi fríggjadag, og eg hev›i ikki tosa› vi› Martin Karl, tá eg fór ni›ur sunnukvøld.

Martin Karl kemur heim um einar fjúrtan dagar, tá sári› er heilt grøtt. Sí›an skal beini› vi› ymiskum bandasjum skapast solei›is, at ein protesa passar. Martin roknar vi› at vera á fótum aftur í ár. Hann er dagliga lærari í Kommunuskúlanum í Havn.

-Eg fari neyvan upp aftur í stiga í lívinum, men eg ætli ikki at gevast vi› at liva. Nú er ta› heila hjá mær bara full drøn frameftir, og eg skal nokk fóta mær aftur, sigur Martin Karl Olsen.

Regina og Martin Karl saman vi› fimm mána›ar gomlu dóttrini. "Lívi› ver›ur ørvísi nú, nú eg havi mist anna› beini›, men eg ætli mær ví›ari, "sigur Martin Karl.

Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard

Martin Karl er útbrotin av nógva heiliváginum, men nú hevur hann ta› betri. Hann fær n‡tt kunstugt bein um stutta tí› og ætlar sær at vera aftur á fótum í ár.

Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard

Ma›ur drukna›ur í Árnafir›i

Stutt á›renn middag mánadagin kom ein alibátur í Árnafir›i fram á ein mann, sum fleyt drukna›ur í sjónum

JOHN JOHANNESSEN

Ein alibátur í Árnafir›i kom mánamorgunin fram á ein mann, sum lá og fleyt lívleysur í sjónum.

Manningin á alibátinum bar skjótt at, fekk drigi› mannin umbor› á alibátin og ba› um hjálp.

Tá ma›urin var komin umbor› s‡ntist, at hann kortini ikki var dey›ur. Hann var› í skundi fluttur á Klaksvíkar Sjúkrahús, men doy›i á›renn hann kom á sta›i›.

Løgreglan í Klaksvík sigur, at ma›urin var farin einsamallur á flot vi› bátinum.

Bilar í knús í Klaksvík

Eitt fer›sluóhapp í Klaksvík leygardagin hev›i stóran materiellan ska›a vi› sær

JOHN JOHANNESSEN

Tveir bilar fóru í knús í Nólsoyarpállsgøtu í Klaksvík leygardagin, tá ein bilur rendi frontalt inn í sí›una á einum ø›rum.

Annar bilurin kom bakkandi út í Nólsoyarpállsgøtu, men leg›i ikki til merkis, at ein annar kom koyrandi nor›anífrá. Bilurin, sum kom koyrandi su›ur gjøgnum gøtuna, rendi í sí›una á tí, sum bakka›i út.

Bá›ir bilarnir fóru í knús, men eingin fólkaska›i hendi. Annar av førarunum var› lagdur inn á Klaksvíkar Sjúkrahús til eftirlit fyri heilaskjálvta, men var› skjótt útskriva›ur.

Rendu saman í bergholinum

Tveir bilar fingu ska›a í Árnfjar›arbergholinum mánamorgunin. Talan var um ein bil, sum kom rendi upp í reyvina á einum, i› koyrdi frammanfyri.

Eingin fólkaska›i hendi.

Tey børn, sum ongan Bassa høvdu at tøma í síðstu viku, og tí ikki fingu ta sera vælumtóktu Creamy-fløguna, fáa nú ein møguleika -

Stovna eina Bassa-konto hesa vikuna - so fært tú eina Creamy-fløgu!

FØROYA SPARIKASSI